FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-095_1.4
dags. 10-06-2010

Jarðfeingi
Att: Kári M. Mortensen

Teldupostur:

Viðv.: Tygara skrivi dagf. 18/5 um borihol til jarðhita
Málið er viðgjørt í felagnum og á stýrisfundi 8/6-2010.

Stýrið vísti áhuga í málinum, serliga í hvønn mun jarðhiti kann nýtast sum burðardygg orkukelda til kommunalar bygningar. Hetta er áhugaverdur spurningur og stýrið fer tí at heita á teg, at koma og greiða frá tykkara royndum á næsta stýrisfundi felagsins í august.

Tú fært eina formliga innbjóðing, tá fundurin nærkast.

Felagið metir annars, at kommunurnar, sum byggimyndugleiki, eiga at verða staðið borgarin vendir sær til um loyvi, áðrenn farið verður at bora. Møguleiki eigur tó at verða, at nýta Jarðfeingi sum ráðgeva, serliga í mun til tekniskar innleggingar.

Kommunurnar kunnu gera reglugerð fyri økið og skotið verður upp, at Jarðfeingi verður nýtt sum ráðgevi í hesum arbeiði.

Sum nevnt verður málið tikið upp á næsta stýrisfundi felagsins eftir summarfrítíðina, har tú ert boðin. Vónandi kanst tú koma á fundin og kann stýrið her, saman við tær, viðgera spurningin um boriloyvi og –reglugerð víðari.

fyri felagið

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo